




# Tað grør um gangandi fót



Val X
BJARNI DJURHOLM
fólkafloksvalevni

***Ongantíð hava so mong havt tað so gott***

Tað gongur ómetaliga væl. Politkkurin hevur hepnast. Virksemið er stórt, arbeiðsloysið er metlágt. Fyritøkurnar hava sunnan rakstur. Og landskassin er skuldarfríur.

4500 løntakara rinda ikki longur rinda toppskatt (57%). Hesir løntakarar eru øll, sum tjena minni enn 270,000 kr árliga. Tað eru tímaløntir løntakarar, handverkarar, starvssett o.o.. Hetta eru lág- og miðalinntøkurnar. Úrslitið av politikki, ið vil nakað.

Býtið millum skattgjaldararnar er eisini javnað rætta vegin – yvir á breiðu herðarnar.

Í Føroyum eru 40,000 skattgjaldarar. Helvtin forvinnur minni enn 150,000 kr árliga og rinda hesi 5% av landsskattinum, sum er um 70 mio kr árliga, meðan hin helvtin, sum tjenar meira enn 150,000 kr árliga, rindar 95% av landsskattinum, sum er um 1360 mio kr!

Politiska avbjóðingin er at halda fast við førda politikkin og harvið vøkstrinum. Smidlig vinnulóggáva, kappingarførur skattapolitikkur og opnar millumtjóða avtalur er politiska avbjóðingin.

# Hvør skal gjalda stóru oljurokningina?



Val X
EYÐUN MOHR VIDERØ
Valevni Fólkafloksins

Trætan millum fiskimannafelagið og reiðarafelagið er farin í baklás, tí partarnir áður hava undirskrivað sokallað protokolat um, at tingast skal seinni um møguligt øðrvísi býti av oljuútreiðslunum millum skip og fiskimenn, nú oljuprísirnir hækka støðugt.

Havi partvíst roynt umstøðurnar við at vera fiskimaður, og hesar vísa, at so hvørt sum útreiðslurnar av rakstrinum hjá skipunum veksa, so hækka útreiðslurnar hjá fiskimanninum tilsvarandi.

Tá tosað verður um eyka rakstrarútreiðslur hjá skipunum til olju, ið tyngja raksturin, og at reiðarin einsamallur rindar fyri hesa hækking, at hesin má partvís verða goldin av fiskimonnunum, so má tilsvarandi svarið hjá fiskimanninum vera, at hýruprosentið má hækka í sama mun, fyri at viga upp ímóti meiruútreiðslunum í dagligu útreiðslunum í húsarhaldinum.

Sjálvur haldi eg, at ein skal vera varin við at undirskriva nakra avtalu um møguligar seinni broytingar í sáttmála, ið viðvíkja møguligum broytingum í rakstrargrundarlagnum.

Tann tíð, tann sorg!

# Einar Føroyar uttan braindrain



Val X
EYÐGUNN SAMUELSEN
valevni hjá Javnaðarflokkinum

Vit kenna trupuleikan, føroyska samfelagi manglar kvinnur, arbeiðsmegi og at útbúgvin fólk koma heimaftur at gagna føroyska samfelagnum. Spurningurin er so hvussu vit loysa henda trupuleikan og um tað eru politikarar, ið verðuliga vilja leggja orku í at venda hesi skeivu gongd.

Tað skulu fleiri ymiskar broytingar til fyri at venda gongdini. Ein avgerðandi táttur er ein miðvísur javnstøðupolitikkur, ið umfatar alt samfelagi frá "toppi til botn".

**Miðvísan javnstøðupolitikk**
Javnstøða millum kyn skal innan 2015 verða ein sjálvsagdur tættur í føroyska samfelagnum. Hetta krevur, at ovasti politiski myndugleikin slóðar fyri at fremja javnstøðu.

Tí hevur Javnaðarflokkurin samtykt, at vit vilja krevja at ásetingin um javnstøðu eisini skal vera galdandi tá ið komandi landstýri verður skipað. Hetta kann gerast við at flokkarnir, ið skipa samgongu, skulu skjóta upp ein persón av hvørjum kyni til hvønn landsstýrissess, og verður tað uppgáva løgmans at tryggja javnstøðu, tá ið landsstýri endaliga verður skipað.

**Tað almenna**
Vit vilja arbeiða fyri einum samlaðum javnstøðupolitikki har Javnstøðulógin frá 1994 skal endurskoðast. Øll lógaruppskot ið verða løgd fram skulu greina ávirkanina á javnstøðu. Ein amboðskassi skal gerast ið inniheldur javnstøðutiltøk og kommununar skulu eisini við í arbeiði.

Tað almenna skal í sínum vali av nevndum og ráðum ganga á odda í at halda kynjaásetingar

**Privati arbeiðsmarknaðurin**
Privatar fyritøkur og nevndir skulu eggjast at fremja javnstøðu

Arbeiðsmarknaðarlóg skal gerast, sum tekur fyrilit fyri og eggjar javnstøðu

Ein samtáttanarætlan gerast fyri arbeiðsmarknaðin í samráði við partarnar á arbeiðsmarknaðinum

**Familjupolitikkur**
Foreldramyndugleiki skal vera felags og hædd skal takast fyri, at tað er barnið, sum hevur rætt til bæði foreldrini

Skipanin um barnsburðarfarloyvi skal broytast, so at bæði foreldur við lóg eru tryggjað barnsburðarfarloyvi

**Útbúgving og gransking**
Kannast skal, hví so nógvar ungar kvinnur flyta av landinum ella hví so nógvar kvinnur ikki vilja flyta aftur til Føroyar eftir at hava verið uttanlands í útbúgvingar- ella arbeiðsørindum. Hetta arbeiði skal gerast í samráð við javnstøðunevndina og KSF

Kynja hagtøl skulu gerast.Granskingarráðið skal fíggjað eina phd verkætlan um lønir í Føroyum. Undirvísingartilfar á øllum stigum skal taka hædd fyri javnstøðu.

Fjølmiðlar skulu í sínum dagliga arbeiði leggja dent á at fremja javnstøðu.

Javnstøða er meir enn at fáa somu løn fyri sama arbeiði ella at eins nógvir menn og kvinnur eru umboðað í løgtingi, landsstýri og aðrastaðni við. Javnstøða snýr seg m.a. um at fáa møguleikar t.d. til eina yrkisleið, at nema sær eina útbúgving, í politiska lívinum, í almenna rúminum, í frítíðini og í privata lívinum.

Javnaðarflokkurin vil tryggja, at javnstøða verður framd í verki.

# Soleiðis setur tú dagsskránna



Val X
HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Tað er gjøgnum málið, gjøgnum orðini og við okkara málburði, at vit skapa tann heim og tað samfelag, sum vit liva í, eins og vit skapa okkara egna samleika. So stóran týdning hevur tann málsligi førleikin. Tað er tann málsligi førleikin, sum ger allan munin, um vit hava eitt ríkt og fjølltáttað samfelag og ríkar og fjølltáttaðar samfelagsborgarar – ella um vit hava eitt fátækt og einstáttað samfelag.

Nýggj málvísind og samfelagsvísind hevur varpað ljós á tann risastóra týdningin, sum fjøllbroyttur málsligur førleiki hevur – fyri skapan og endurskapan av tí samfelagi, sum tú ert ein partur av. Og at tú dugir at siga ta góðu søguna um títt samfelag og tann heim, tú livir í.

Samfelagið er ikki bara nakað sum er til, og ein meldur har tú mást finna tær eitt hóskandi pláss. Tað eru tú og eg sum skapa samfelagið, og tað er okkara málsligi førleiki, fram um allar møguligar aðrar førleikar, sum er tað skapandi amboðið. Og tann sum dugir best at handfara amboðið – hevur eisini valdið, setur dagsskránna og ger av, hvat hevur týdning, og hvat ongan týdning hevur.

Tí er tað av so risastórum týdningi, at vit áhaldandi bera klípi og við hvørt eisini stórar steinar til tann málsliga varða, sum skal gera okkum før fyri at seta dagsskránna.

Og tí er tað so alt avgerðandi at vit satsa upp á at geva okkara ungdómi eitt so fjølbroytt og dygdargott málsligt og fakligt grundarlag í skúla, í heimi og í øllum samfelagsligum høpum.

Tí skal skúla- og mentunarpolitikkur raðfestast høgt - ongantíð ov høgt.

# Landssjúkrahúsið - Óhugnin breiðir seg



Val X
NIKLÁI PETERSEN
Tjóðveldi

Sera hugstoytt at hoyra um hesi vánað viðurskiftir, ið valda á okkara stórsta sjúkrahúsi. Má viðganga, at eg ikki visti, at støðan var so út av lagi, men at alt ikki hevur rugga rætt á Landssjúkrahúsinum í longri tíð, er onki nýtt.

Landsins hægsti leiðari - okkara háttvirdi løgmaður, hevur í fleiri umførum víst okkum borgarum á, hvussu nógv hevur verið lagt í heilsuverkið av sitandi landstýri.

Hann bedýraði so seint sum leygarkvøldið, hvussu ótroyttiliga arbeiðssamur sitandi landsstýrismaður var.

Einar 400 mió.kr eru kanaliseraðar til heilsuverkið seinastu 4 árini, men hvat er allur hesin peningur nýttur til, má man spyrja.

Sjúklingar eiga at kenna seg tryggar, tá teir verða innlagdir til viðgerðar, tað er alfa og omega fyri viðkomandi.

Nú er tíð uppá, at onkur slar nevan í borðið.

Eg haldi, at løgmaður ella avvarandi landsstýrismaður skildar øllum føroyingum eina frágreiðing um hví arbeiðsklimaði á Landssjúkrahúsinum, er so vánaligt.

Almanna- og heilsumál kosta landskassanum yvir 2 milliardir kr. í 2008, og tað er ein helvt av fíggjarlógini.